# Tað týdningarmesta er ikki at vinna

**Olympiska slagorðið sigur okkum, at tað týdningarmesta er at taka lut. Og tað er í øllum førum nakað, sum ítróttarfólkini á hesum myndunum hava tikið til eftirtektar. Kanska halda tey ikki sjálv, at støðurnar eru so stuttligar, men hjá okkum øðrum kann tað kortini vera mikið undirhaldandi at hyggja at**



*Kanska er tað lættari at skora, um eg fái málmannin burtur...*



*Hvussu ólukkan sleppi eg nú niður?*



*Hatta má vera tað, sum tey kalla strikeout!*



*Hatta frísparkið rakti múrin!*




*Hann luktaði ikki so illa. Hvussu man hann smakka?*

## *Í rangastrúpan*

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***

**So er at senda heroinið við postinum**
»§ 1. Postsendingar, sum ikki verða mettar at innihalda tollskyldugar vørur, ella vørur, sum eru bannaðar at innflyta, hevur postverkið tó heimild at útflýggja beinleiðis til móttakaran uttan um to Ilvaldið.«
Kunngerðarblaðið

**Mannfólkaprát**
»Har hevur tú fýra kúlur, men tú hevur tvær afturat!«
3-2 í sjónvarpinum

**Nú tú sigur tað...**
»...tá ið tað so einaferð fer at bragda hjá unga liðnum hjá KÍ, so skulu úrslitini og stigini fara at koma«
Dimmalætting

**Hon sá tað á røddini**
»Sambært kvinnuni var politisturin sjónliga irriteraður av at ringt var á støðina hendan leygardagin beint eftir døgurðan«
Norðlýsið

**Var hann í kilti?**
»Skoti á opnari gøtu«
Skíggjatekstur í Degi og Viku

**Kanska el-drivin**
»...varð skotið inn gjøgnum ein bilrút, sum kom út á R. C. Effersøesgøtu í Havn.«
www.dimma.fo

**Skot ella krasj?**
»Skotið varð úr einum bili, sum koyrdi eftir R. C. Effersøesgøtu, inn í ein bil, sum stóð parkeraður.«
www.uf.fo

**Full javnstøða**
»Fleiri kvinnur og ung til avvenjingar «
www.portal.fo

**Varð hann handtikin**
»Simon Anholt í Miðlahúsinum«
www.portal.fo